

Filmsvika

*Kim Simonsen ummælir*

# Nátúrunnar syngjandi børn

## – Eitt sindur um íslendskan film

Í samband við Norðurlendsku Filmsvikuna í hava fleiri íslendskir filmar funnið sær leiðina til Føroyar og Norðurlandahúsið. Sunnudagin klokkan 17 er eisini ein framløga um íslendskan film.

Ísland er av álvara komi á heimskortið innan bókmentir og tónleik, við nøvnum sum Björk, Sigur Rós, Múm, Sjón og Slowblow.

Í mínum hugaheimi er íslendskur skaldskapur, tónleikur og filmur ikki nationalromantiskar gliturmyndir – sum vit møta hjá føroyskum nationalistum - men um tað Ísland, ið er líka fremmant yvir fyri nationalromantikki, sum eg eri tað.

### Filmsstuðul

Nakað av tí dýrasta innan mentan, er at gera film. Ein vanligur spælifilmur kostar minst 18 milliónir krónur at framleiða. Smærri lond hava tí ikki megnað at gjørt film. Sjálvt um Ísland er lítið í altjóða høpi, hava tey tó framleitt spælifilmar síðani 1980.

Í 1978 settu íslendingar á stovn almennan filmsstuðul, og við eitt kom verulig gongd á framleiðsluna av filmum. Longu seint í 1970inum komu



*Tað var eitt veruligt lop fyri íslendska filmslist í altjóða høpi, tá íslendski filmurin "Naturens børn" var í uppskoti til ein Oscar í 1991*

fleiri útbúnir filmsleikstjórar til Íslands. Hesi høvdu nomið sær útbúgvingar á altjóða filmskúlum. Longu í 1978 stovnaðu íslendingar ein filmsgrunn, og í 1979 fóru íslendingar í gongd við at gera tríggjar filmar.

Aðrir filmar, ið eg havi dámt væl eru, til dømis "Havet" (2002) eftir Baltasar Kornmákur, "Cold Fever" og "Universets engle" og "Djævlens Ø" (1996) eftir Fridrik Thor Fridriksson (1995), "Nói albínói" (2003) eftir Dagur Kári. Hesin seinasti er útbúgvin í Danmark og er um at fáa eitt veruligt gjøgnumbrot í Evropa. Íslendskir filmsleikstjórar eru annars ofta útlærdir í USA, Polen, Kekkia og so framvegis. Kendastur er Fridrik Thor Fridriksson, næst eftir honum Baltasar Kornmákur og nú Dagur Kári.

Í 1991 varð roadfilmurin 'Naturens børn' instillaður til ein Oscar. Leikstjórin var Frídrik Thor Fridriksson, sum saman við Einari Már Gudmundssyni skapti henda film.

# Í mýruni

★★★★☆☆

Okkurt er púra galið í Íslandi. Her hugsi eg ikki bert um hættisligu fíggjarstøðuna, og at íslendski búskapurin er dottin saman sum ein illa smíða kroysa, men um krimisøguna Mýrinn hjá heimskenda Arnaldur Indriasson

### Fínt undirhald

Hesin íslendski krimihøvundin hevur megna at hugtikið allan heimin, og hann er helst ein av teim mest listnu krimihøvundunum í heiminum, undir liðuni av Stig Larson og Lisu Marklund.

Í filminum "Mýrinn" er alt, sum skal við í eina krimi. Hendan bótasúpanin er kryddað við sterkum ingrediensum sum løgnum morðum, lygnum og myrkum familjuloynidómum.

Kriminalinspektørurin er sum teir altíð eru, ein einari og ein løgin fiskur. Ein outsidari, sum hevur misálit á øllum heiminum – ein góður eginleiki hjá løgreglufólkum. So her er alt sum tað eigur.

Tað er eingin annar enn Baltasar Kormákurs, sum



*Kriminalinspektørurin í filminum "Mýrin" er sum slíkir skulu vera - ein løgin fiskur og ein outsidari*

hevur filmatiserað hesa kendu krimiskaldsøguna. Hann er annars kendur fyri at gera listafilmar, so sum "101 Reykjavik" (2000) og "Havið" frá 2002. Hesin seinasti hevði egnað seg ótrúliga væl til føroyskar hyggjarar, tí hann snýr seg um eina familju, sum eru reiðarar og eiga eitt flakavirki á bygd.

Tað er ikki so nógv at siga um hendan krimifilmin, annað enn at hann fungerar og fær "the job done" fínt undirhald sum kann seljast um allan heimin.

Mýrinn (krimi). Ísland 2006
Leikstjóri Baltasar Kormakur
92 min.
Filmsvikan, 12. oktober, kl. 20

Sosialurin